# Best um øll børn

**KUNOY – Eg havi gingið her frá 1. flokki. Og hetta er ein góður skúli, sigur Jón Josephsen, sum gongur í 5. flokki í Kunoyar skúla. Spurningurin nú er, um Jón framvegis sleppur ganga her, ella um øll børnini verða koyrd í hin skúlan í oynni, tann í Haraldssundi**

Snorri Brend

Hetta er sum einhvør annar skúlatími í Kunoyar skúla. Ein lærari og næmingar hansara í eini og somu skúlastovu.

Teir fýra næmingarnir – Jón, Ivan, Rannvá og Ronja – sita so hugagóðir við síni borð og lesa. Og hví skuldu teir ikki tað?

Beint frammanundan hava tey verið uttandura og hildið fríkorter eina løtu í einum av landsins minstu ella størstu og vakrastu skúlagørðum.

Niðanvert skúlan rennur áin. Líta tey upp í loft, reisa fjøllini seg prúð og høg yvir bygdina. Og hyggja tey úteftir, gevur Kalsoyarfjørður teimum eitt útsýni sum broytist fleiri ferðir um dagin.

Nú eru tey komin inn aftur í skúlastovuna. Inn aftur til álvaran og skyldurnar í skúlanum. Og inn aftur til ein væl upplagdan lærara, Jóhannes Johannessen sum er úr Klaksvík.

– Jú, mær dámar væl at ganga her, sigur elsti næmingurin í Kunoyar skúla, Jón Josephsen, sum gongur í 5. flokki.

Onkur av hinum næmingunum vil eisini geva sítt íkast til prátið, og heldur, at lærarin í Haraldssundi er nokkso strangur.

– Her hjá okkum er nógv best, kemur tað sannførandi frá einum øðrum næmingi.

Tað verða so í øllum førum ikki tey sum koma at taka ta endaligu avgerðina um framtíðina hjá skúlunum í oynni.



**» Okkum dámar væl at spæla teldu, hoppa í trampolin, sparka og sóritt**

**SKÚLAGARÐUR**

*– Hetta er ein fínur skúli, men eg haldi, at vit áttu at havt eitt spælipláss í bygdini, sigur Jón Josephsen sum gongur í 5. flokki í Kunoyar skúla. Saman við honum eru tríggir aðrir næmingar – uttast vinstrumegin bróðir hansara Ivan Josephsen, og honum við lið tær báðar Ronja Erlingsdóttir Høgnesen og Rannvá Andreassen, sum báðar ganga í 1. flokki*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Men tað verða hinvegin tey sum koma at merkja fylgjurnar av avgerðini sum einaferð verður tikin.

## Tey til okkum

Jón og skúlafelagar hansara hava neyvan hoyrt um tann fundin, sum skúlastýrini í Norðoyggjum høvdu fyri tveimum mánaðum síðani.

Har tosaðu tey um framtíðar skúlabygnað í Norðoyggjum, út frá teim ætlanum sum mentamálaráðharrin, Helena Dam á Neystabø hevur um ein nýggjan skúlareform.

Á hesum fundinum varð skúlin

**» Her hjá okkum er nógv best**

hjá Jón, Ivan, Rannvu og Ronju eisini nevndur. Hann var ikki bara umrøddur, men spurningurin varð settur, hvørja framtíð ið hann hevur.

Skúlastýrini eru í øllum førum sinnað til at tað í framtíðini bert verður ein einstakur skúli í oynni - annaðhvørt tann í Kunoy ella tann í Haraldssundi.

Sjálvt um hetta er ein stórur spurningur fyri ein 11 ára gamla drong, so ivast Jón ikki, tá hann leysliga verður spurdur um hetta:

– Eg haldi, at tað er best, um